





DJ COOL og DJ TECH

# Flagsa mitt á nátt

Tveir av best umtóktu DJ'unum í Føroyum fara at undirhalda í Flags-tjaldinum á Summar Festivalinum.

Summar Festivalurin kann bjóða eina ørgrynnu av livandi tónleik á palli, men møguleiki verður eisini at dansa til tónar, sum tveir av fremstu DJ'unum í Føroyum hava at bjóða.

Bæði leygarnáttina og sunnunáttina verður DJ show í Flags-tjaldinum á Summar Festivalinum, og tað verða DJ Cool og DJ Tech, sum fara at standa fyri tónleikinum.

DJ Cool hevur ferðast land og ríkið runt sum plátuvendari. Hann hevur hitað stórar áhoyrarafjøldir upp til nøvn sum Nik & Jay, DJ Aligator, Sash, SOAP, Rene Diff og Anna David. DJ Cool var í nógv ár fastur DJ í Club 20, og nú er hann fastur, fúsur á Eclipse og Rex í Havn.

DJ Tech er nógv umbiðin til tiltøk kring alt landið. Hann var í fleiri ár DJ í Club 20 og telist nú millum teir, sum standa fyri undirhaldinum á Rex og Eclipse í Havn.

DJ Cool og DJ Tech hava royndir í at fáa eina og hvørja áhoyrarafjøld at kóka, og tað fara teir eisini at gera mitt á nátt í Flags-tjaldinum á Summar Festivalinum.

ANNA HÁBERG

# Tað kostar nógv at fara á pallin

Anna Háberg hevur sungið á fleiri ymiskum gospelútgávum – eitt nú Bros og hjá MC Restorff – men í fjør gav hon umsíðir út sína egnu fløgu.

- Hetta er mín fyrsta fløga, og hon er mær sera persónlig og kensluborin. Ogg má eisini siga, at tað fyri fyrstu ferð kostar mær nógv at standaa palli frammanfyri fólki og syngja hesar sangir, sum kensluliga lata meg so nógv úr, sigur Anna Háberg.

- Men eg gleði meg eisini sera nógv og eg vóni at fólk taka tónleikin og tekstirnar til sín har sum tey eru stødd í lívinum, sigur hon

Anna Háberg var í fjør eisini tilnevnd til virðisløn á Planet Awards, og tá var sagt, at Anna hevði við útgávuni víst, at hon telist millum bestu songrøddir í landinum.

- Anna Háberg megnar í ein nærum óhoyrdan mun í føroyskum høpi, at lata kenslurnar leka út gjøgnum røddina. Hetta er so inniligt sum tað blívur, var sagt í grundgevingini fyri hennara tilnevning.

Og nú tekur Anna Háberg enn eitt tónleikaligt stig - Hon verður við á størsta festivalinum í landinum.



SÁMAL RAVNSFJALL

# Festligi vísu-sangarin

**Sámal Ravnsfjall er landskendur fyri at syngja skemtiligar og undirhaldandi vísur. Øll kenna sangin um Medistaran í karry, og á Trappuni hjá Lenu hendi mangt og hvat. Sámal Ravnsfjall hevur eisini spælt í Vágabólkum, og hann hevur eitt spennandi repetoire at taka av, tá hann leygarkvøldið fer at undir halda í Flags-tjaldinum. Tað var uttan iva ein av teimu minniligu løtunum á hesum Summar Festivalinum.**

PÁLL FINNUR PÁLL

# Tað verður neyvan festligari

Argandi tekstirnir eru eisini eitt sereyðkenni hjá bólkinum, men hóastyrkingarnar hjá bólkinum kunnu verða bæði stingandi og argandi, syngja og spæla teir við einum frískum glimti í eyganum. Framførslurnar hjá Páll Finnur Páll eru framúr góðar, og teir duga sera væl at fáa fólkið við. Tað hava teir víst til stór tiltøk kring landið.

Stóru hittini hjá bólkinum eru sangirnir um Herbergið og Forelskaða Sjónleikaran, men teir hava fleiri aðrar frálíkar sangir, sum tey ungu kenna væl.

Páll Finnur Páll fer í august mánaði at spæla á Summar Festivalinum í Klaksvík. Bólkurin hevur havt fleiri minniligar konsertir á Summar Festivalinum, og teir koma aftur á festivalin í ár at seta sín eyðkenda dám á tiltakið.